# NEVNDARFRÁSØGN 2019

## REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP



## Yvirlit yvir limirnar:

All Oceans Logistics Sp/F
Bakkafrost Farming
Bal-Bulk P/F
Faroe Ship P/f
Frakt & Sand Sp/f
Mariner Sp/f
Nolsø Shipping Sp/F og Furesea Sp/f
Samskip P/f
Sandgrevstur P/F
Silver Liner Faroe Islands Sp/f
Skansi Offshore
Skipafelagið NorLines Sp/f
Smyril Line P/F
SVITZER Faroe Islands P/F
Thor P/F
Thun Sp/F
Tindhólmur

## UM FELAGIĐ

Reiðarafelagið fyri Handilsskip (RFH) er felag fyri reiðarar av føroyskum handilsskipum.

Endamál felagsins er at savna allar reiðarar fyri føroysk handilsskip til at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum farmaskipum, eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna. RFH er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Hesi seinnu árini er felagið og virksemi í felagnum munandi vaksið og telur í dag 17 limir umboðandi 78 skip.

### Í nevndini í RFH sita:

**Jens Meinhard Rasmussen, formaður**
**Hentzar Steingrímsson, næstformaður**
**Gunnbjørn Joensen**
**Rúni V. Poulsen**
**Jónas Sigmarsson**
**Sjúrður Johansen**
**Bogi P. Nielsen**

# FELAGIÐ Í TØLUM

Í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip (RFH) eru nú 17 limir, sum umboða 78 skip. Í 2020 varð samlaða tonnagan  uml. 321.000 BT, í mun til 320.000 BT og 350.000 BT í ávikavist 2019 og 2018. Limirnir eru virknir innan m.a. siðbundnan farmaflutning, ferðafólkaskip og tænastuskip innan alivinnu og oljuvinnu. Afturat hesum fevnir shipping eisini um atknýtt virksemi á landi.

Tey flestu skipini í RFH eru skrásett í FAS, og nú talið av skrásetingum í FAS er meira støðugt, ger tað sama seg eisini galdandi fyri limatalið í RFH.

At ein stórur partur av reiðaríunum, sum hava skip í Føroysku Altjóða Skipaskránni, lata seg umboða í RFH, fegnast nevndin um, tí tað hevur týdning at vinnan stendur saman um at fáa vinnugreinina fram á leið, soleiðis at hon alsamt gerst ein størri og týdningarmiklari partur av føroyska vinnulandslagnum.



# SHIPPINGVINNAN Í FØROYUM

Shippingvinnan er ikki einans tengd at samfelagsgongdini í Føroyum, men heldur at gongdini í heimsbúskapinum. Hetta merkir, at stóru konjunktursveiggini, sum javnan merkja føroyska búskapin, kunnu javnast við eini slíkari vinnugrein.

Júst tí er týdningarmikið, at dentur verður lagdur á at fremja shipping sum vinnugrein í Føroyum.

Sum sæst á stabbamyndini niðanfyri, eru eisini á landi rættuliga fitt av starvsfólki, sum eru tengd at vinnugreinini. Mett verður, at umleið 350 fólk á landi hava sín vinnuveg í einum reiðaríi, sum er limur í RFH, og hetta eru meiri enn 20% fleiri enn í 2018, tá RFH byrjaði at savna tøl um starvsfólk í vinnugreinini.

Á sjónum er talan um umleið 1.400 sjófólk í 2020. Av hesum eru knapt 600 føroyingar, umleið 350 úr hinum norðanlondunum og umleið 450 aðrastaðni frá. Sum sæst á myndini niðanfyri, er samlaða talið av sjófólki lækkað eitt vet í 2020 samanborið við 2019, og lækkingin sæst í talinum av útlendingum umborð. Talið av føroyingum umborð seinasta árið stendur í stað.

Ein avbjóðing er framvegis at fáa føroyskar fulltiknar dekkarar til skipini, og tørvurin á útlendskari arbeiðsmegi er enn átrokandi, tí føroyska arbeiðsloysið er metlágt. Hetta kann vera orsøk til, at talið av sjófólkið er minkað. Tað er greitt, at um Føroyar skulu vaksa sum shippingland, er neyðugt at hava útlendsk sjófólk umborð. Hetta er galdandi fyri Føroyar á sama hátt, sum hetta er galdandi í londunum kring okkum.









## SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

Sáttmálarnir millum RFH og tey trý manningarfeløgini, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag, gingu út 1. mars 2019.

RFH hevur tilsamans níggju sáttmálar við tey trý manningarfeløgini. Við hvørt felag er ein høvuðssáttmáli og tveir sersáttmálar fyri ávikavist størri og smærri skip í frálandavinnu.

RFH og manningarfeløgini samráddust saman um felags krøv, men RFH samráddist við hvørt felagið sær í mun til serkrøv til einstaku sáttmálarnar.

Semjan varð undirskrivað við øll trý manningarfeløgini tann 1. mars 2019. Sáttmálarnir vóru longdir við tveimum árum til 1. mars 2021 við ávísum broytingum. Eftirlønin hækkaði 1. mars 2020 til 11,25%, og aftur 1. mars 2021 til 12,5%. Tilsamans hækkaðu løn og eftirløn við ávíkavist 3,26% fyrra árið og 2,56% seinna árið.

# STRATEGI FYRI FELAGIÐ

Á heysti 2019 var strategi gjørd fyri felagið, sum lýsir arbeiðið hjá RFH, vinnukarmar og støðu felagsins í føroyska vinnulívinum.

Niðanfyri eru partar av strategiska grundarlagnum lýstir.

Visión:
Shipping skal vera millum fýra tær størstu útflutningsvinnurnar í Føroyum.

Missjón:
Savna allar reiðarar fyri føroysk handilsskip og útinna felags áhugamál.

Strategisk mál:

1. Víðka um ávirkan og skerpa profilin hjá RFH
2. Tryggja at vinnan lýkur altjóða krøv
3. Tryggja at vinnan er kappingarfør í altjóða høpi
4. Fáa øll føroysk reiðarí innan handilsskip sum limir
5. Betra tænastu til limir
6. Fíggjarligt skynsemi

Hesar ætlanir eru fyri komandi fimm árini til 2025. Nevndin fer tó árliga at eftirmeta og viðgera strategi felagsins fyri at tryggja, at ætlanin framhaldandi er í samsvari við umstøður og avbjóðingar í vinnugreinini.



# RFH VERTUR FYRI AÐALFUNDINUM HJÁ ICS

International Chamber of Shipping, ICS, hevði í døgunum 12. og 13. juni aðalfund sín á Hotel Føroyum. Reiðarafelagið fyri Handilsskip var vertur og skipaði í sambandi við aðalfundin eisini fyri ferð út í Tindhólm og undir Sørvágsbjørgini og fyri døgurða á Hotel Hafnia, har eisini landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum Poul Michelsen sýndi ta vælvild at luttaka.

ICS er fremsta altjóða vinnugreinafelagið fyri handilsskipareiðarar og umboðar yvir 80% av altjóða handilsflotanum. ICS umboðar reiðarar í IMO og í øðrum viðkomandi felagsskapum. Tað er eisini ICS, sum á hvørjum ári ger ta viðurkendu Flag State Performance Table, ið ger upp góðskuna á altjóða skipaskráunum, og har Føroyska Altjóða Skipaskráin liggur millum tær allarbestu.

Vitjanin var stak væleydnað, og Jens Meinhard Rasmussen, formaður í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, fegnast um høvið at vera vertur fyri ICS aðalfundinum 2019. Tað hevur týdning, at vit við at bjóða starvsfeløgum úr øllum heiminum hendavegin vísa, at Føroyar eru eitt framkomið samfelag, sum eisini innan shipping hevur eina nútímans og kappingarføra vinnu og eitt regluverk á altjóða støði. Umframt aðalfundin skipaði RFH eisini fyri útferðum og døgurðum, har luttakarnir fingu høvi m.a. at hitta umboð frá føroyskum vinnulívi og landsstýrismannin í vinnumálum, Poul Michelsen.

Formaðurin í ICS, Esbern Poulsson, sendi eftir vitjanina eina takkarheilsan fyri ein serstakliga góðan og vælskipaðan aðalfund, og eisini fegnast hann um frálíku upplivingarnar, sum øll nevndin við makum høvdu í Føroyum.









# RFH VIRKIÐ TIL LØGTINGSVALIÐ 2019

Til løgtingsvalið 2019 hevði RFH tvey valynski, sum felagið vildi seta á breddan. Hetta vóru ítøkilig mál, sum RFH vildi hava eina komandi somgongu at taka upp og fáa loyst.
Valynskini hjá RFH vóru ein partur av átakinum hjá Vinnuhúsinum undir valinum, og tey vóru sjónlig á industry.fo og facebook, bæði sum skriv og video.

## VALYNSKI 1 - REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP YNSKIR BETRI MARKNAÐARATGONGD

Kappingarneytarnir hjá føroyskari shipping eru ikki í Føroyum, men um allan heimin.

Dentur skal leggjast á, at Føroyar aftur fáa fleiri tvískattaavtalur enn tær, vit hava í dag. Serliga verður hugsað um lond, har okkara skip hava møguleika at virka aktivt beint nú, men eisini er neyðugt at hava atlit til framtíðar møguleikar. Eisini skal ferð setast á arbeiðið at fáa avtalur um cabotagusigling í londunum í Europa.

Shipping er ein altjóða vinna. Tað hevur tí stóran týdning, at bæði vinna og myndugleikar fylgja við altjóða rákum og altjóða sáttmálum, soleiðis at føroysk skip altíð lúka tey krøv, sum verða sett altjóða. Samstundis hevur tað týdning at arbeitt verður ímóti, at serlig national krøv verða gjørd. RFH hevur ta grundleggjandi støðu, at vit eiga ikki at hava serlig national krøv í Føroyum.

Okkara altjóða kappingarføri er treytað av, at okkara skip sleppa at virka undir somu reglum sum tey skip, vit kappast við, og at vit hava atgongd til somu marknaðir.

Føroyska shippingvinnan hevur ikki ynskir um at fáa lagaligar treytir at virka eftir her heima. Tað, vinnan ynskir, eru júst altjóða krøvini, hvørki meira ella minni.

Okkara kappingarføri er tó eisini tengt at møguleikunum at koma inn á so nógvar marknaðir, sum yvirhøvur gjørligt. Her verður serliga hugsað um tvískattaavtalur og avtalur um cabotagusigling.

Føroyskir myndugleikar gera eitt stórt arbeiði við at leggja seg eftir, at føroyska reglusettið altið er dagført í mun til altjóða ásetingar. Tað hevur tó eisini týdning, at orka verður sett av til at geva okkara skipum atgongd til somu marknaðir, sum kappingarneytarnir hava atgongd til.

Um Føroyar høvdu havt fleiri tvískattaavtalur, og um Føroyar høvdu havt avtalur um cabotagusigling í Europa, var okkara kappingarføri munandi betri.

Føroysk skip eru avmarkað í kappingini, tí at kappingarførið verður ov ringt orsakað av  manglandi avtalum millum Føroyar og onnur lond. Tað eru ítøkilig dømi um, at føroysk reiðarí hava fingið bjóðað ordrar, men orsakað av manglandi avtalum Føroya við onnur lond, eru hesar farnar aftur við borðinum.

Føroyar hava fyrr havt tvískattaavtalur við heilt nógv av heimsins londum, men hesar hava vit ikki longur. Í løtuni hava Føroyar tvískattaavtalur við norðurlondini; Bermuda, Jomfrúoyggjar og Cayman Islands; Bretland og Norðurírland; Guernsey og Jersey; India; Isle of Man og Sveis. Hetta er als ikki nøktandi í mun til tørvin hjá føroysku shippingvinnuni, og eitt komandi landsstýri eigur at leggja dent á at betra um hetta.

Harafturat tørvar okkum avtalur um innanlands flutning, cabotagusigling, við londini á evropeiska meginlandinum. Ávíst arbeiði hevur verið gjørt í felagsnevndini, sum viðger handilssáttmálan millum Føroyar og ES, men her eigur at verða sett størri orka inn.

Á sama hátt sum handilsavtalur hava týdning fyri tær fyritøkur, sum inn- og útflyta vørur, hava avtalur um t.d. cabotagusigling og tvískatt týdning fyri shippingvinnuna. Tí má landsstýrið seta orku av, so tað á hesum økinum verður komið munandi longri fram á leið.

## VALYNSKI 2 - KAPPINGIN UM ARBEIÐSMEGINA SKAL VERÐA JØVN

Neyðugt er at broyta okkara skattareglur soleiðis, at tað ikki skal loysa seg betur at arbeiða uttanlands heldur enn í Føroyum.

Serligi skattafrádrátturin fyri inntøku, sum kemur undir § 25b, stk. 1 í skattalógini skal verða tikin burtur.

Shipping sum vinnugrein er eyðkend av, at hon fyri ein meginpart virkar á altjóða marknaðinum. Hetta merkir, at føroysk handilsskip kappast beinleiðis við útlendsk handilsskip á øllum økjum, eisini um arbeiðsmegina.

Serliga síðan 2008 hevur shipping í Føroyum verið ein vinnugrein í vøkstri. Í 2019 vísir kanning millum limirnar í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, at umleið 900 føroyingar hava sín vinnuveg innan føroyska shippingvinnu, av hesum 600 á sjónum. Grundarlag er fyri, at vinnugreinin framhaldandi kann vaksa, men her krevst arbeiðsmegin, og kappingin um hana er hørð, bæði innanhýsis í Føroyum, men eisini við reiðarí í okkara grannalondum.

Tíverri er støðan soleiðis, at skattalógin ger mun á føroyingum, sum arbeiða uttanlands, og føroyingum, sum arbeiða í Føroyum.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip vísir á, at støðan ikki er haldbar, og hesum er Landsstýrisins Skattanevnd samd við okkum í.

Í frágreiðing síni til landsstýrið 1. december 2017 skrivar Skattanevndin, at tað fyri so vítt er búskaparliga skilagott, at tað er lætt og ómakaleyst at búgva í einum landi og arbeiða í øðrum. Men skattaskipanin eigur ikki at miða eftir, at tað er meira lønandi at arbeiða uttanlands enn í tí landinum, ein býr.

Ítøkiliga sigur skattanevndin, at javnari skatting av løntakarum, sum búgva og arbeiða í Føroyum, og løntakarum, sum arbeiða uttanlands hevði havt við sær, at kappingarstøðan hjá føroyskum arbeiðsgevarum hevði eisini verið javnari í kappingini um arbeiðsmegina.

Tilgongdin til at fara frá líkningarháttinum eksemption linking til credit linding er byrjað. Hetta er gott, men hetta er ikki nokk. Fyri kappingarførið í mun til arbeiðsmegina ger henda broyting lítlan og ongan mun, tí frádrátturin á tær upp til 120.000 krónurnar framhaldandi er óbroyttur.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip heldur, at tað skal altíð kunna loysa seg sum føroyingur at arbeiða í Føroyum, og ítøkiliga valynski hjá felagnum er, at føroyska samfelagið má gevast við at skatta fólk av landinum at arbeiða.

# LÓGARBROYTINGAR SÍÐAN SEINAST

Sum nevnt omanfyri tekur RFH undir við, at Føroyar fylgja altjóða sáttmálum. Tí verður eisini tikið undir við lógarbroytingum, sum eru ein avleiðing av føroyskari luttøku í altjóða samstarvi. Flestu lógir og kunngerðir, sum verða sendar til hoyringar, eru avleiðing av okkara altjóða bindingum, og tá hevur RFH sjálvdan viðmerkingar til uppskotini.

Øll hoyringssvarini eru annars at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo

Í mai 2019 varð loðslógin broytt í skundi, og RFH fekk ikki høvi at gera viðmerkingar til broytingaruppskotið. Broytingarnar merktu, at tann veruleiki og tær mannagongdir, sum í langa tíð hava verið vanligar í shippingvinnuni, vóru broyttar, uttan at vinnan sum heild var við í tilgongdini. RFH vísti á, at tað var sera óheppið, at politiska skipanin soleiðis gjørdi broytingar í kørmunum, sum vinnan virkar undir.

Kunngerð um broyting í kunngerð um loðsing, gjøld o.a. var send til hoyringar í juni 2019. Broytingarnar vóru ein tillaðing í mun til broytingar í loðslógini, sum kom í gildið fyrr í árinum. RFH hevði ikki viðmerking til broytingina í kunngerðini, uttan enn einaferð at vísa á, at loðslógin ikki var send felagnum til hoyringar.

Eftir áheitan frá RFH vóru broytingar í tonsaskattalógini sendar til hoyringar í januar 2020. Uppskotið bar við sær, at tonsaskattaskipanin verður dagførd og kappingarfør í mun til onnur lond. Somuleiðis skal virksemi víðkast, sum kann verða fevnt av skipanini. RFH gjørdi í hoyringssvarinum m.a. vart við týdningin av, at tonsaskattalógin kann fevna um alt virksemi, sum er knýtt at flutningsveitaranum. Freistin at viðmerkja uppskotið var 15. januar, og uppskotið er ikki sent løgtinginum enn.

1. januar 2020 varð markið fyri innihaldið av svávul í brenniolju, sum verður brúkt á skipum og havstøðum, sett niður á 0,5 vekt %. Hetta er partur av áltjóða lóggávu, og lógarbroytingin var sett í gildið í 2017.

Afturat hesum vinnugreinaserligu hoyringssvarum er RFH partur av teimum yvirskipaðu hoyringssvarum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag gevur á vinnu- og arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum.










## SAMANUMTIKIÐ

Samanumtikið er at siga, at tað áhaldandi er neyðugt at tryggja kappingarførið og marknaðaratgongdina hjá føroyska handilsflotanum og shippingvinnuni.

Limirnir í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip hava ein virknan leiklut í føroyska vinnulívinum. Knapt 1.800 starvsfólkum eru knýtt at vinnugreinini, bæði á sjógvi og á landi, og talan er um eina altjóða vinnu, sum er knýtt at altjóða búskapinum. Hetta styrkir føroyska búskapin við at javna út konjunktursveiggj við størri fjølbroytni í inntøkum og virksemi í landinum.

Tað hevur týdning, at Føroyar eisini hava atgongd til somu marknaðir sum kappingarneytarnir, og her saknar Reiðarafelagið fyri Handilsskip, at meira verður gjørt frá politiskari síðu. Serliga eru tað tvískattaavtalur og avtalur um cabotagusigling, sum vanta millum Føroyar og onnur lond.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip fer áhaldandi at vísa á, at neyðugt er at strika skattafrádráttin fyri inntøku undir §25b í skattalógini. Skattaskipanin eigur ikki at miða eftir, at tað skal verða meira lønandi at arbeiða uttanlands enn í tí landinum, ein býr. Um skattafrádrátturin verður tikin burtur gerst kappingarstøðan hjá føroyskum arbeiðsgevarum eisini javnari í kappingini um arbeiðsmegina.

Mangul á arbeiðsmegi er ein støðugt avbjóðing fyri limir í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, tí sera torført er at fáa fólk til dagligu uppgávurnar.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip fer framhaldandi at gera sítt til, at korini hjá føroyska handilsflotanum og hjá føroyskari shippingvinnu batna, soleiðis at vit sum frá líður veruliga koma á heimskortið sum shippingtjóð.

14. februar 2020
Nevndin í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip
Jens Meinhard Rasmussen, formaður



REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP


Adressa
Óðinshædd 7
PO Box 1038

Telefonnummar
298 309900

Teldupostur
jorun@industry.fo

Fartelefon
298 739913

Heimasíða
www.industry.fo